# TILTØK

**Fuglafjarðar kirkja**
Týskvøldið kl. 20.30 Sálma- og sangkvøld.

**Gudstænastur 18. sunnudag e. Trinitatis**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00 Magnus Jørgensen og Heri Joensen, altarg.
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00 Sonja Klein, talvan gongur fyri KFUM skótarnar í Føroyum
***Nólsoy:*** kl. 12.00 Bjarni Bæk
***Sandavágur:*** kl. 11.00 David Johannesen
***Selatraðar kirkja:*** kl. 12.00 Sverri Steinhólm
***Fuglafjørður:*** kl. 11.00 konfirmatión, Uni Næs
***Hósvík:*** kl. 11.00, Marjun Bæk
***Hvalvík:*** kl. 12.00, Mogens Tilsted Christensen
***Norðskála:*** kl. 10.40 skriftamál, kl. 11.00, Messa, Emil Olsen
***Tvøroyri:*** kl. 11.00, Jónsvein Bech
***Øravík:*** kl. 12.15, Jónsvein Bech

**Sjómanskvinnuringurin í Havn og á Argjum**
Farið verður til Vestmanna sunnudagin 25. september. Tilm. á tlf. 313422 til og við mikudegi tann 21 sept. Bussur fer frá Farstøðini kl. 10.00.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa v/Biskop William Kenney í Mariukirkjuni.
www.katolsk.fo

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíblutími og bønarløta.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni. Kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 12.00 verður eisini møti. Peter Hansen, trúboðari á Papua New Guinea talar.
Mánakvøldið kl. 19.00 verður ungdómstiltakið BeTWIX sum er fyri ung í aldrinum 5.-7. flokk. www.hebron.fo

**Meinigheitshúsið**
Týsdagin kl. 20.00 Bíbliutími, Náhum kap. 2.
Mikukvøldið kl. 19.00 Meinigheitskórið venur.
Hósdagin kl. 16.00-16.45 Gentukórið venur. Kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 9.30-12.00 Foreldur og børn.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.00 Møti í Vesturkirkjuni – Felagsmøti við KMF.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla (fimleikarhøllin)*
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.
www.livdin.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti við Kurt Christensen.
Hósdagin kl. 16.00 Eldrahugni.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18.00 Evangel. møti. www.gospel.fo

**Frá Ebenezer**
Mikudag kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti, dópur verður. Talari: Petur Hansen, trúboðari í Papua New Guinea.
Hósdag kl. 20.00 Ungdómsmøti og kvinnumøti.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, talari: Zacharias Zachariassen.
www.ebenezer.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børnini.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Bøn fyri Føroyum og øðrum tjóðum, kl. 20.00 Felags bønarmøti í Evangeliihúsinum.
Í morgin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Bøn fyri býnum og Ísrael, kl. 19.00 Delli.
Hósdagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Bøn fyri samkomuni, kl. 19.00 Chil.
Fríggjadagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Lyegardagin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Rúna Rasmussen, ABC v/ Alex O'Campo – evnið: Lovsangur, kl. 11.50 Sunnudagsskúlin kl. 15.30 Samkomfundur.

**Sandavágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman í Meinigheitshúsinum hóskvøldið kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 Undirvísing og bøn.
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Símun Absalonsen talar.

**Miðvágs missiónshús**
**Sjómanskvinnuringurin**
byrjar aftur mikukvøldið 21. sept. kl. 19.30. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Barnakórið venur mikudagar kl. 17.00.

**Saron, Haldórsvík**
Týskvøldið kl. 20.00 Húsmøti hjá Henny Vík.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Jan Jacobsen.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við Paula Høj, sangur við bólkinum Purpur. Barnamøti kl. 11.00.
www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mánadagin kl. 20.00 Ungdómsmøti hjá Sóley Smith, Toftir.
Mikudagin kl. 17.30 Tim. 5. Kl. 19.30 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 17.00 Liljur.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30, Arvid Hansen talar. Evnið: Gudsóttans ávirkan á náttúruna. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Týskvøldið kl. 21.30 Bønarmøta.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbiltími við Mikkjal Joensen, 1. kor. kap. 4.
Hóskvøldið kl. 20.00 venur gospelkórið »Gleðið«. Kl. 21.30 Bønarløta.
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti – Kinatoymi greiðir frá túri í Kina, kl. 21.00 Ungdómsmøti við Jákup. Øll eru vælkomin
www.kuff.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími, 1. Kor. 15. kap. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Týskvøldið kl. 20.00 Bíbliutími og bøn. Evnið: Gal. 1.

**Suðuroy**
Sjómanskvinnuringarnir í Suðuroy samlast í bygdarhúsinum í Fámjin leygardagin 24. sept. kl. 18.00. Sjómanstrúboðarin verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Týsdagin kl. 20.00 Streingjakórið øvar.
Mikudagin kl. 20.00 Heimaforbundið – allar kvinnur eru vælkomnar.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.hotel-orkin.com

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagin 19. september***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45 Enskt, talumál 1. Hilda Frýdal.
kl. 14.00-17.00 Kortspæl, telving, bobbspæl, landastrok, dart og onnur spøl. ***Matgerð: Anne Grete Harlou, tilm. 316391. Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúla-skipanini hvønn miku- og fríggjadag frá kl. 10.00-13.30.***
***Týsdagin 20. september***
kl. 10.00-11.30 Vit syngja, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00 Barnaminnir, Heri Mohr sigur frá
***Mikudagin 21. september***
kl. 10.00-12.00 Matgerð, Anne Grete Harlou
kl. 12.00 Døgurði. Møguleiki er at koma sum gestir. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 10.00-17.00 Handarbeiði, Dominobinding, binding á knagum o.a.
***Hósdagin 22. september***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45 Enskt talumál 2 – Ásmundur Johannesen
kl. 14.00-17.00 Teldruprát, Brandur Petersen
kl. 14.00-16.00 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 23. september***
kl. 10.00-17.00 Matgerð – Anne Grete Harlou
kl. 12.00 Døgurði. Møguleiki er at koma sum gestir. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 10.00-12.00 Tekning og máling (havi tilfar við). Vegleiðing er á staðnum.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eldrafelagið Kumlá**
á Skála hevur hugnaløtu í húsum felagsins í kvøld kl. 19.00.

**Tilhaldin Hugnin í Sandoynni**
Er opið mánadag og mikudag kl. 14.00 til 17.00. Drekkamunur er at fáa báðar dagarnar eins og bløðini eru til taks. Øll eru vælkomin.
***Mánadagin 19. september***
Hoyra søgu.
***Mikudagin 21. september***
Spæla ymisk spøl.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
***Mánadagin 19. september***
Fimleikur
***Týsdagin 20. september***
Prát og sangur. Vit spæla landastrok.
***Mikudagin 21. september***
Boccia
***Hósdagin 22. september***
Pappír útskering v/ Hjalmar Olsen.
***Fríggjadagin 23. september***
B***yrjandi enskt v/ Annette Gaardlykke.***

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Kvinnufundur kl. 20–21.00.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
Fundir fyri avvarðandi at alkoholikarum er týskvøldið kl. 21.00 í gomlu lærara íbúðini í Glyvra skúla.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Giktafelag Føroya**
**MBF-húsið**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13.00 til 16.00.

**Hjartafelagið**
Postboks 3120, 110 Tórshavn
e-mail: hjarta@hjartafelag.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið: Ella 316261, Tone 261165, Hans Jákup 778170, Guðrið 314607. Arni 222552

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

## Brúdleyp

Leygardagin 24. september kl. 16.00 giftast í Hósvíkar kirkju Sigrid Olsen og Finn Christensen, Hósvík. Døgurði verður fyri innbodnum. Opið hús verður í Bygdarhúsinum í Hósvík frá kl. 21.00.

Leygardagin 24. september kl. 15.00 giftast í Torsted kirkju í Horsens, Iva Súsanna við Streym, ættað av Norðskála og Jesper K. Thomsen, ættaður úr Askov. Brúdleypsadr.: Dagnæs Sognegård (Oasen), Sognegårdsvej 3, 8700 Horsens.

Leygardagin 8. oktober kl. 13.00 giftast í Kollafjarðar kirkju, Marjun Hansen, Kollafjørður og Høgni Sloan Justesen, Kaldbak. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, verða biðin um at siga frá á tlf. 210726, 210627 ella 421178 áðrenn 24. september.

## Silvurbrúdleyp

Týsdagin 4. oktober hava Asta og Eivind Jacobsen, Sørvágur, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Miðvági leygarkvøldið 8. oktober kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúdleypsparið við at koma í veitslu verða biðin um at siga frá á tlf. 332245 ella 282245 eftir kl. 18.00 áðrenn mánadagin 3. oktober.